# Hervør og Høgni eru aftur

Í nýggju lesibókini *Hervør og Høgni í triðja* verður miðja móti, at næmingarnir venja lesingina enn meir, og at teir skilja tað, teir lesa.

Ein fløga fylgir við bókini, har allur teksturin er lisin inn. Á hendan hátt kunnu næmingarnir brúka allar sansir, meðan teir lesa og lurta, so lesiupplivingin verður tess størri.

Bókin fylgir Hervør og Høgna og teirra vinum gjøgnum eitt skúlaár og ymsu árstíðirnar.

Í bókini eru ymisk tekstasløg. Summir partar eru ætlaðir til næmingin at lesa uppá heima og so lesa aftur í skúlanum. Aðrir partar eru ætlaðir at viðgera í skúlanum, til dømis sangir, uppskriftir av ymsum slag og tekstir um fiskar.

Til bókina eru tvær arbeiðsbøkur, ið flestu næmingar kunnu arbeiða sjálvstøðugt við.

**ave**




*Føroya Skúlabókagrunnur gevur nú út triðju lesibókina um Hervør og Høgna*





Vit sóknast eftir nýggjum starvsfólkaleiðara.

Í Eik leggja vit dent á ein virknan starvsfólkapolitikk, fyri at vit framhaldandi kunnu varðveita og draga dugnalig starvsfólk til Eik samtakið. Góður trivnaður, arbeiðsgleði og støðug starvsfólkamenning eru samstundis lyklaorð, tá tað snýr seg um at veita kundunum framúr fakliga og persónliga ráðgeving.

**Starvið**
Starvsfólkaleiðarin vísir beinleiðis til stjórnina, og er sparringspartnari hjá stjórnini, deildarleiðarum og starvsfólkum í Eik. Sum starvsfólkaleiðari hevur tú møguleika at orða og mynda framtíðar starvsfólkapolitikkin hjá Eik. Saman við leiðarunum hevur starvsfólkaleiðarin ábyrgd av at skapa rammur og møguleikar fyri víðari menning av hvørjum starvsfólki sær. Ymsar fyrisitingarligar uppgávur liggja eisini á Starvsfólkadeildini, t.d. setan og útbúgving av starvsfólkum, lønarútgjalding og frítíðaruppgerðir.

**Fakligir førleikar**
Vit vænta, at starvsfólkaleiðarin hevur útbúgving innan starvsfólkaøkið og gjarna eisini bankabakgrund. Hetta er tó ikki eitt krav, tí persónligu eginleikarnir hava serstakan týdning fyri at kunna røkja starvsfólkaleiðarastarvið.

**Persónligar eginleikar**
Evnini at samstarva, samskifta og lurta mugu vera góð. Vit ynskja okkum eina eldsál, ið eggjar øðrum til og torir at ganga á odda. Stundum krevst eisini, at starvsfólkaleiðarin loysir ósemjur, og til tess krevst dirvi, innlit og oftani eisini humor. Menniskjakunnleiki, áhugi fyri starvsfólkaviðurskiftum og innlit í Human Ressource Management er eitt gott grundstøði.

Áhugað kunnu venda sær til Bjarna Olsen, stjóra, á telefon 348575, teldupostur bjarni.olsen@eik.fo.

Starvið verður sett skjótast gjørligt og lønt sambært avtalu. Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 8. juli kl. 12.00.

Umsóknir skulu stílast til:
**Eik Banka**
Att.: Bjarni Olsen, stjóri
Yviri við Strond 2
100 Tórshavn

Í Eik samtakinum starvast á leið 400 fólk á 15 deildum kring landið, í dótturfelagnum Inni P/F og í dótturfelagnum Eik Bank Danmark A/S. Á starvsfólkadeildini Yviri við Strond í Havn starvast umframt leiðaran trý fólk.

www.eik.fo


# Bjargaði orkestrinum hjá føroyska frelsunarherinum




*Sambært ævisøguni "Jeg er ingen blomst" fekk norski kommandørurin Haakon Dahlstrøm stóran týdning fyri virksemið hjá frelsunarherinum í Havn*

**Sambært nýggjari bók er tað norska kommandørinum Haakon Dahlstrøm fyri at takka, at orkestrið hjá frelsunarherinum ikki datt niðurfyri í síni tíð**

ÆVISØGA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Norski kommandørurin Haakon Dahlstrøm hevur havt ein lyklaleiklut í tónleikaliga virkseminum hjá hópin av samkomum í Frelsunarherinum. Í nýggju ævisøguni um Dahlstrøm, *Jeg er ingen blomst*, verður millum annað greitt frá, um tá norski kommandørurin í 1937 varð sendur til Føroya at bjarga hornorkestrinum hjá Frelsunarherinum.

### Byrjan til útimøtini

Í bókin greiðir høvundurin Emil Skartveit, frá, hvussu ein ósemja um gjald av ljóðførum var orsøkin til, at hornorkestrið hjá frelsunarherinum í Havn varð dottið niðurfyri. Tískil var Dahlstrøm boðsendur, og onkursvegna eydnaðist tað honum at fáa lív aftur í orkestrið.

Í eitt ár stjórnar Dahlstrøm sjálvur orkestrinum, og gevur hann luttakararnum tvær hondskrivaðar nótabøkur, tær sokallaðu Færøyjournalirnar. Tónleikastykkini verða spæld so ofta, at luttakararnir til endan duga tey uttanat.

Dahlstrøm hevði nevniliga eisini aðrar ætlanir við vitjanini. Hann hevði sett sær fyri at skipa fyri útimøtum á hvørjum gøtuhorni í Føroyum hvørt fríggjakvøld, uttan mun til, hvussu veðrið var.

Ætlanin hjá norska kommandørinum eydnaðist betri enn væntað, og tískil var hansara uppgáva loyst. Eftir eitt ár í Føroyum fór Haakon Dahlstrøm víðari á síni lívsferð, ið verður lýst í ævisøguni Jeg er ingen blomst – *En rejse gjennom kommandør Haakon Dahlstrøms liv.*